Tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
Tíðindaleiðari: Justinus Eidesgaard

Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Stefan í Skorini
Ítróttur: Jákup Mørk
Myndamenn: Jens Kristian Vang, Ólvur Haraldsen
Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdís Árnadóttir
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820 **Fax.** 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: P/F Prentmiðstøðin

Kommunuvalið – eitt einfalt val

Oddagrein

NÓGV eru vallyftini, nú kommunuvalið stendur fyri durum. Fleiri lyfti eru afturvendandi, meðan onkur nýfikkin politikari roynir seg við onkrum nýggjum, eitt nú at beina fyri vespunum í Havn, og uppaftur aðrir royna at taka sær heiðurin av onkrum góðum máli, har teir halda seg hava havt ein fingur við í spælinum.

SOLEIÐIS er altíð, tá stundar til val. Men tað eru ávís mál, ið meira eru kommunal mál, enn onnur mál. Eftirhondini hava kommunarnar ikki so nógv at siga til eitt nú skattaprosentið. Ein orsøk er, at landsmyndugleikin hevur læst fast eitt skattaprosent á einum ávísum stigi. Annað er, at kommunurnar sjálvar hava læst seg fastar so tætt við ovara markið, at har er ikki so nógv at gera, og fáur kommunupolitikari dittar sær tí at lova lægri skatt.

MEN ansingartørvurin hevur ein alt størri leiklut í kommunupolitikkinum. Ikki bara barnaansingartørvurin, men eisini tørvurin á plássum til eldru medborgarar okkara.

TÓRSHAVNAR býráð samtykti í 1996, at barnaansingartørvurin skuldi verða loystur innan 10 ár. Út frá hesum stevnumiði hevur kommunan virkað, og var ætlanin, at fáast skuldi til vega 30 pláss um árið. Hóast hetta talið hevur hildið, so hevur barnatalið vaksið nógv meira, enn mett varð um, og er tørvurin tí framvegis sera stórur.

Á býráðsfundi í Havn hóskvøldið var til viðgerðar endamálsorðing frá sosialu nevnd um at loysa allan barnaansingartørvin fyri 2003. Men henda endamálsorðing varð ikki samtykt - og málið beint aftur í nevndina.

TAÐ er sjálvandi stórt mál at seta sær hjá kommununi at binda seg til at loysa allan tørvin - 100%. Men hvat kunnu borgararnir annað krevja? Hoyrir tað nakrastaðni heima, at kommunan bert vil tryggja tørvin eitt nú 75%?

SPURNINGURIN er púra greiður, tí valið stendur ímillum, um vit vilja velja politikarar at stýra kommunum okkara, sum vilja varðveita og stimbra vælferðarsamfelagið, ella um vit velja politikarar, ið ikki halda, at øll neyðvendigvís skulu hava somu kor, tí at pengarnir skulu brúkast til okkurt annað.

EITT kommunuval er ikki at val millum fullveldispolitikarar ella sambandspolitikar. Valið er einfalt, og kravið er einfalt. Vit skulu velja fólk at stýra okkara kommunum, sum taka sosialu viðurskiftini inn at hjarta. Fólk, sum veruliga vilja loysa barnaansingartørvin, fólk, sum veruliga vilja loysa tørvin á røktar- og ellisheimsplássum og fólk, sum veruliga vilja gera nakað fyri sosialu neyðina, sum týðiligast er komin til sjóndar í høvuðsstaðnum.

Sosialurin

Nýggja føroyska vaktarskipið verður kanska lagt beinanvegin

– Fíggjarmálastýrið og manningarfeløgini hava nú ikki meiri enn fýra dagar at fáa sáttmálaviðurskiftini umborð á nýggja vaktarskipinum í rættlag. Annars sleppur skipið ikki at loysa frá bryggju í Noregi

ÁKI BERTHOLDSEN

Vandi er fyri, at tað nýggja, føroysk vaktarskipið verður lagt, longu áðrenn tað yvirhøvur sleppur at loysa frá bryggju í Noregi.

Eftir ætlan skal tað handast landsstýrinum 21. oktober, men nú er vandi fyri, at tað verður rakt av verkfalli beinanvegin, so at tað ikki sleppur til Føroyar sum ætlað.

Orsøkin er, at ongin sáttmáli er fyri teir, sum skulu sigla við skipinum.

Og fyrrenn sáttmáli eg gjørdur, kann skipið ikki loysa.

Í sáttmálunum ímillum manningarfeløgini og Fíggjarmálastýrið stendur, at fær Vaktar- og Bjargingartænastan nýtt skip, skulu samráðingar verða við manningarfeløgini um nýggjar sáttmálar.

Hetta er bæði galdandi fyri Skipara- og navigatørfelagið og Maskinmeistarafelagið, sum hava yvirmenninar undir sær og fyri Starvsmannafelagið, sum hevur dekkararnar undir sær.

Ein nýggjur sáttmáli er ein avgjørd treyt fyri, at nýggja vaktarskipið yvirhøvur sleppur at loysa í Noregi.

–Við ongum sáttmála, sleppur skipið ikki at sigla, so greitt er tað, sigur Ellintur Abrahamsen, formaður í Skipara- og navigatørfelagnum

Eftir ætlan skal nýggja vaktarskipið handast landsstýrinum 21.oktober. Men nú er vandi fyri, at skipið verður lagt og tískil ikki sleppur at loysa úr Noregi

Gongur ongan veg

Men fyribils má staðfestast, at tað gongur púra ongan veg at gera hendan nýggjan sáttmála.

Ein kunnandi fundur var mitt í september ímillum Fíggjarmálastýrið øðrumegin og Skipara- og navigatørfelagið og Maskinmeistarafelagið hinumegin.

Seinni var ein aftur ein fundur um nýggjan sáttmála.

Triði fundurin varð hósdagin, og tá høvdu manningar væntað og vónað, at ein nýggjur sáttmáli skuldi koma undir land.

Ellintur Abrahamsen sigur, at tað skuldi ikki verið nakað til hindurs fyri at komið undir land tá, tí tær broytingar, sum skulu gerast eru rættiliga einfaldar.

– Tað snýr seg heilt einfalt um at broyta lønina og ongi annað, sum tekniskt kundi verið meiri trupult, sigur hann.

Men formaðurin í Skipara- og Navigatørfelagnum sigur, at fundurin var eitt vónbrot, tí tey komu ikki av fetinum.

–Vit løgdu okkara sjónarmið fram, men so hendi ikki meiri, tí vit fingu onki svar, sigur Ellintur Abrahamsen.

Sostatt fóru partarnir frá hvørjum øðrum og nýggjan fund ber ikki til at hava fyrrenn 16. oktober.

Og tá sansar av álvara at, tí sostatt hava partarnir bara fýra dagar at viðurskiftini í rættlag inntil skipið verður handað tann 21, oktober.

Ellintur Abrahamsen vil ikki avdúka krøvini hjá Skipara- og Navigatørfelagnum. Men tað skilst kortini, at kravið er ein nokk so fittlig lønarhækking.

Hann sigur, at tað er avgjørt neyðugt at fáa ein nýggjan sáttmála.

– Yviremnn á vaktarskipum í grannalondum okkara hava líka nógv eftir av lønini, tá ið skatturin er goldin, sum vit fáa í løn, áðrenn skatturin er goldin, sigur Ellintur Abrahamsen

Gunnleiv bíðar

Hinvegin eru samráðingarnar við tað triðja av manningarfeløgunum, Starvsmannafelagið, als ikki byrjaðar enn.

Gunnleivur Dalsgarð, formaður, sigur, at Starvsmannafelagnum hevur gjørt vart við hjá fíggjarmálastýrinum og hann væntar fundarboð fyrsta dagin.

Lesið meira á síðu 7

Tøkk

Øllum tykkum, sum á ymiskan hátt mintust mammu okkara

SIGGU MALENU RASMUSSEN
Søldarfjørður

tá hon doyði og varð jarðað, takka vit hjartaliga.

Børnini

Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, ið mintust okkum við vitjanum, uppringingum, hjálp á ymiskan hátt, blómum og gávum, tá elskaði maður mín, pápi, verpápi og abbi okkara

TÓRUR ZACHARIASEN
vanliga nevndur Tórur í Hesti

lá sjúkur og andaðist.

Ein serlig tøkk til heimahjálpirnar og heimasjúkrasystrarnar, sum gjørdu tað møguligt, at hann kundi vera heima ta seinastu tíðina.

Hjalgrim Davidsen, Oddmar á Steig og Sverri Steinhólm, tøkk fyri góð orð í heiminum og í kirkjuni. Salli Lognberg, tøkk fyri góðu orðini og sangin á grøvini, somuleiðis tøkk til Sørin Steinhólm fyri góða forsangin.

Tøkk, øll tit, ið fylgdu honum úr heiminum og úr kirkjuni út í kirkjugarðin.

Tøkk tit, sum hjálptu til eftir jarðarferðina.

Stóra tøkk øll somul.

Fyri tey avvarðandi
Esther, Karin, Jónatan, Eyðun og Fríða

Burtur úr likaminum – heima hjá Harranum.

Treytir fyri valgreinar

Av royndum vita vit, at sera nógv verður skrivað, tá val er í hondum. Tí hevur blaðleiðslan gjørt av, at innsent politiskt tilfar í samband við kommunuvalið komandi verður avmarkað í longd til eina A4 síðu í vanligari skrift - ella áleið 3.000 tekn - saman við andlitsmynd av valevninum.

Øll valevni er kortini vælkomin at skriva í Sosialinum, men tilfar, ið ikki lýkur treytirnar, kemur ikki í blaðið.

Blaðleiðslan